VÁGA KOMMUNA

# Gerðabók

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 27.09.2022 kl. 18:00 |
| **Fundarstaður:** | |
| **Málnr.:** | 21/00003 |
| Til staðar: | Bjarni Prior, Albert Ellefsen, Dagbjørn Hansen, Rósa Samuelsen, Jónhard Selfoss, Tórdis Dam Johannesen, Ásla Leila Johansen, Sólfríð Fjallsbak, Jóanis Albert Nielsen, Herborg Gaardlykke |
| Varalimir: | |
| Ikki til staðar: | Jens Gaardlykke |
| Aðrir partar: | Sølvi Simonarson |
| Fundarskrivari: | Jóhan Hendrik Ellefsen |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Kunning** | | | |
| 10/22 | 22/00039-8 | Mál beind í nevnd 7/22 | 2 |
| **Til støðutakan** | | | |
| 47/22 | 22/00234-42 | Visjón fyri Vága kommunu | 3 |
| 48/22 | 22/00379-4 | Umsókn um Byggiloyvi til vakstrarhús á matr. nr. 401 í Vatnsoyrum | 4 |
| 49/22 | 22/00467-2 | Sundurbýti millum matr. nr. 34a og 293f í Sandavági til ummælis | 6 |
| 50/22 | 22/00196-6 | Fíggjarætlan fyri 2023 1. viðgerð | 7 |
| | | | |

VÁGA KOMMUNA

Kunning

# 10/22  Mál beind í nevnd 7/22

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 27.09.2022 | 10/22 |

**Málslýsing:**

**Býráðið 27. september 2022:**

Tikið til eftirtektar.

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

Til støðutakan

**47/22 Visjón fyri Vága kommunu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 14.06.2022 | 38/22 |
| 2 Býráðið | 27.09.2022 | 47/22 |

**Málslýsing:**

Býráðið hevur, saman við umsitingini síðani desember 2021, arbeitt við at orða eina visjón fyri Vága kommunu. Hetta arbeiði er nú endaligt, og verður lagt fyri býráðið til endaliga støðutakan:

## Visjón 2032

**Ein framfúsin og fevnandi kommuna**
Yvirskipaða visjónin fyri Vága kommunu er, at kommunan skal verða framfúsin og fevnandi. Á ferðini komandi 10 árini mótvegis 2032 strembar Vága kommuna eftir at gerast ein tann mest áhugaverda kommunan at búgva í og ein kommuna, har øll trívast.

*Ein kommuna har øll vilja búgva*
Býarmenning skal á dagsskránna sum liður í einum burðardyggum framburði
Kommunan skal draga borgarar at sær og leggja upp til ein sunnan vøkstur komandi árini

*Ein virkin og skapandi kommuna*
Vit skulu virka fyri nýskapandi kørmum, vinnuni, mentanini og ferðavinnuni til frama
Vit skulu draga at okkum fjølbroyttar vinnufyritøkur, mentan og ferðafólk

*Í fremstu røð innan tænastur og umstøður til borgarar*
Vit skulu stremba eftir at vera í fremstu røð innan tænastur til allar borgarar
Vit skulu menna kommununa við fjøltáttaðum bústaðarmøguleikum og frítíðartilboðum

**Býráðið 14. juni 2022:**

Borgarstjórin bað um at málið verður tikið av skránni til víðari viðgerð. Hettar varð samtykt.

**Býráðið 27. september 2022:**

Einmælt samtykt.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

# 48/22 Umsókn um Byggiloyvi til vakstrarhús á matr. nr. 401 í Vatnsoyrum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 18.08.2022 | 44/22 |
| 2 Tekniska nevnd | 15.09.2022 | 49/22 |
| 3 Býráðið | 27.09.2022 | 48/22 |

## Málslýsing:

Eigarin av matr. nr. 401 í Vatnsoyrum søkir um byggiloyvi til vakstrarhús.

Vakstrarhúsið er 32 m$^2$ og kemur at standa 2,0 m frá marki móti matr. nr. 400a og 299g.

Umsøkjarin hevur viðlagt váttan frá grannunum um at teir ikki hava nakað ímóti at vakstrarhúsið verður bygt nærri marki enn 2,5 m sum er ásett í byggisamtyktini.

## Viðmerkingar frá umsitingini:

Tekniski leiðarin mælir til at geva loyvi til at byggja vakstrarhúsið, við tí grundgeving at frávikið bert er 0.5 m, og at ongin vandi er fyri eldi frá einum vakstrarhúsið.

## Nýggar upplýsingar í málinum:

Umsøkjarin hevur sent ein teldupost til kommununa har hann greiðir frá hví vakstarhúsið ikki kann staðsetast aðrastaðni á stykkinum.
Eisini ynskti hann ein ástaðarfund saman við tekniska leiðaranum og borgarstjóranum.

Borgarstjórin, formaðurin í teknisku nevnd og tekniski leiðarin vóru á ástaðarfundi saman við umsøkjaranum, har hann greiddi frá hvussu støðan var og at tað vóru rennur, kloakk og ein innilokað á, sum lógu í vegin fyri at broyta staðsetingina.

Tekniski leiðarin og formaðurin í teknisku nevnd mæla til at geva frávik so byggiloyvi kann gevast.

Tekning, ið vísir rennur, kloakk og innilokaða á saman við telduposti frá umsøkjaranum er lagt við í málinum.

VÁGA KOMMUNA

**Tekniska nevnd 18. august 2022:**

Samtykt ikki at geva frávik frá ásetingunum í almennu byggisamtyktini.

**Tekniska nevnd 15. september 2022:**

Tekniska nevnd mælir til at geva frávik og byggiloyvi.

**Býráðið 27. september 2022:**

Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 49/22 Sundurbýti millum matr. nr. 34a og 293f í Sandavági til ummælis

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 15.09.2022 | 51/22 |
| 2 Býráðið | 27.09.2022 | 49/22 |

**Málslýsing:**

Umhvørvisstovan hevur sent umsókn um sundurbýti til samanleggin millum matr. nr. 34a og 293f í Sandavági til ummælis.

Ætlanin er at býta niðasta partin av matr. nr. 34a, á Ovastuhjallar 10 frá og leggja tað saman við matr. nr. 293f, Miðhjallar 13.

Matr. nr. 34a verður tá 1497 $m^2$ og samanlagdi matrikulin verður 891 $m^2$.

**Viðmerking frá umsitingini:**

Tekniski leiðarin mælir frá at viðmæla umsóknini, tí grundstykkini hava góðkendar adressur og eru í góðkendari útstykkingarætlan.

**Tekniska nevnd 15. september 2022:**

Tekniska nevnd mælir frá.

**Býráðið 27. september 2022:**

Samtykt at beina málið aftur í nevnd.

Formansváttan:________

VÁGA KOMMUNA

## 50/22 Fíggjarætlan fyri 2023 1. viðgerð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.08.2022 | 56/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.09.2022 | 64/22 |
| 3 Býráðið | 27.09.2022 | 50/22 |

**Málslýsing:**

Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja fram uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember 2022

**Viðmerkingar hjá umsitingini**

Uppskot til fíggjarætlan fyri 2023 byggir á eina framrokning av fíggjarætlanini fyri 2022, + eina hækking uppá 1,95%
Íløgurnar eru tiknar úr langtíðaræltlanini við tillagingum.

| | | |
|---|---|---|
| Rakstrarútreiðslurnar eru mettar til | kr. | -97.907.616,- |
| Løgur eru mettar til | kr. | - 30.501.564,- |
| Inntøkurnar eru mettar til | kr. | 109.736.237,- |
| RLÚ = | kr. | – 18.672.943,- |

**Fíggjarnevndin 24. august 2022:**

Viðmælt.

**Fíggjarnevndin 21. september 2022:**

Viðmælt.

**Býráðið 27. september 2022:**

Einmælt samtykt.

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

Fundurin lokin kl. 18.23

Bjarni Prior

Albert Ellefsen

Dagbjørn Hansen

Rósa Samuelsen

Jónhard Selfoss

Tórdis Dam Johannesen

Ásla Leila Johansen

Sólfríð Fjallsbak

Jóanis Albert Nielsen

Herborg Gaardlykke

Formansváttan:__________